Kyndil-KÍF 40-24 (20-9):

# Sorl á Hálsi

**Kyndil vann fyri fyrstu ferð í ár sannan stórsigur, tá illa sperdu kollfirðingarnir ikki fingu givið stórvegis mótstøðu**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt er, at tað er ein náttúrligur munur á toppi og botni í bestu mansdeildini. Men tá botnliðið so eisini má vera tveir av týdningarmestu monnunum fyriuttan, so gerst munurin risastórur, og hetta varð eisini staðfest í Høllini á Hálsi sunnudagin, tá Kyndil tók ímóti KÍF.

Longu fyrstu fáu minuttirnar kom eitt ordans hol ímillum liðini bæði, og so var tað fyri tað mesta bara ein spurningur. Nevnliga hvussu stórur sigurin hjá Kyndli skuldi verða. Mest av øllum, so mundu kollfirðingarnir bara bíða eftir, at klokkan í høllini skuldi ýla fyri seinastu ferð, og tá hon loksins gjørdi hetta, so var munurin altso uppá 16 mál.



*Janus Einar Sørensen gjørdi eitt ordans hál sunnudagin. Ikki færri enn tíggju mál fekk strikuspælarin hjá Kyndli*
*Mynd: Finnur Justinussen*

Hjá Kyndli er hetta so nógv tann størsti sigurin á árinum. Hóast teir næstan hvørja ferð hava verið omaná, so hevur munurin aloftast verið sera lítil, og í so máta mundi tað kennast fløvandi við einum trivaligum sigri hesaferð. Ikki minst tí teir komandi vikuskifti skulu í holt við eitt VÍF-lið, sum nú veruliga tykist vera komið fyri seg, og tað er av álvara nakað, sum líkist einum branddysti.

Hjá KÍF er ikki stórt annað at gera, enn at lyfta høvdið og gera seg til reiðar til komandi uppgávuna. Hendan verður móti hinum havnarliðnum, Neistanum, sum eisini liggur væl fyri á talvuni, og so er spurningurin, hvørt kollfirðingarnir tá í stærri mun megna at leggja forðingar fyri.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-KÍF 40-24 (20-9)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Janus Einar Sørensen 10(1), Hans Áki Dal-Christiansen 8(1), Høgni Klein 7, Sigtór Andreasen 6, Jacob Jónsson 4, Ken Zachariasen 4, Hans Arni Thomsen 1
**KÍF:** Mirko Milenkovic 5(1), Petur Martin Poulsen 5, Gert Hansen 5, Teitur Joensen 3, Jónálvur Johannesen 3, Hallur Hansen 2, Arnbjørn Hansen 1
**Brotskøst:** Kyndil 3, KÍF 1
**Útvísingar:** Kyndil 4, KÍF 3
**Dómarar úr Tjaldur:** Trygvi Mortensen & Kári Hansen

VÍF-Stjørnan 15-16 (7-10):

# Botnvánaligt

**Verjurnar stóðu seg væl, men annars er lítið positivt at siga um oddabrakið í Vestmanna, sum fyri tað mesta líktist einum botndysti**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lagt var upp til satt brak í Vestmanna sunnudagin. Talan var um toppdyst í bestu kvinnudeildini, har tey bæði bestu liðini skuldu gera av, hvørt teirra skuldi leggja seg á odda í deildini, og tí var einki løgið, um áskoðararnir høvdu stórar vónir til dystin.

Men vónirnar vórðu ikki uppfyltar – og nakað so langt ífrá. Tvørtur ímóti vórðu áskoðararnir vitni til ein óvanliga vánaligan hondbóltsdyst, har mistøkini vóru ófatuliga nógv í tali, og har leikferðin ongan tíð náddi teimum hæddum, sum tað av røttum kann roknast við í slíkum dysti.

### Rótut

Hóast spælið á vøllinum sjáldan nakað at reypa av, so skerst tó ikki burtur, at spenningurin um úrslitið alla tíðina var stórur. Frá byrjan av dystinum fylgdust liðini bæði á máltalvuni, og við denti á tøttu verjurnar eydnaðist í øllum førum at avmarka talið av bóltum, sum funnu vegin fram til meskarnar. Stjørnan fekk tó ein lítlan glotta, tá stutt undan steðginum togaðu seg trý mál framum, og sum dysturin tá hevði tikið skap, so kundi tað bent á, at talan her gjørdist um eina avgerandi leiðslu.

Men tað var VÍF als ikki við uppá. Komnar út til seinna hálvleik var heilt annað lag á hjá teimum. Umframt verjupartin, har tær framvegis løgdu størsta dentin, so fekst nú eisini ferð a´kontra-spælið, og eftir lítlari løtu høvdu tær aftur fingið javnvág í roknskapin. Ivaleyst var júst hetta frægasta løtan hjá VÍF í dystinum, men onkursvegna, so sleptu tær so aftur fullkomuliga, tá tær høvdu vunnið seg ájavnt Stjørnuni.

Og so gekk restin av dystinum í sama tempo. Eingin leikari tóktist megna at lyfta liðfelagar sínar, soleiðis at nakað meira av flogi kundi koma yvir álopsspælið, og nógvu nærdystirnir viðførdu í fleiri



*Heldur ikki Ioana Rápa megnaði at skræða seg leysa av føstu verjuni hjá Stjørnuni, sum við sigrinum hevur lagt seg á odda í bestu deildini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

førum steðgir og útvísingar, sum eisini viðvirkaðu til, at hvørgin av pørtunum nakran tíð fann nakra rútmu.

Alt meira bendi tað tann vegin, at Stjørnan skuldi fara avstað við sigrinum og oddasessinum, og tá tær so tveir minuttir undan leikloki løgdu seg tvey mál á odda, so tóktist allur ivi vera burtur. VÍF megnaði tó at fáa spenning í aftur, tí eftir at hava minkað um munin, so fingu tær eisini møguleikan til eitt seinasta álop, men hesin møguleikin var spiltur, og so gjørdist ikki meira. Stjørnan fór við sigrinum og stigunum, og nú eru tað tær, sum eru á odda.

### Oddadystir fyri framman

Spurningurin er so, hvussu leingi tær kunnu halda fast um oddasessin. Skal metast eftir spælinum hesaferð, so verður tað ikki serliga leingi, men tað er tó lítið at ivast í, at tær fara at spæla onkran dystin betri enn hendan. Fyrskomandi høvið til hetta verður í Havn næsta vikuskiftið, tá tær vitja hjá Neistanum, og tað líkist enn einum oddadysti.

Hjá VÍF verður steðgurin til næsta dyst enn styttri. Longu hósdagin skulu tær spæla móti VB. Fyrst og fremst, so er talan tá um dyst, sum skal gera av, hvat liðið skal fylgja við Stjørnuni í oddinum, og so er spurningurin, hvørt undirhaldsvirðið tá verður nakað hægri, enn tað var sunnudagin.

### Dysturin í tølum

**VÍF-Stjørnan 15-16 (7-10)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Ioana Rápa 6(1), Nikolina Eyðbjørnsdóttir 4, Jacklin Durhuus 2, Irina Radovici 2, Sóley Mikkelsen 1
**Stjørnan:** Joan M. Djordjevic 4(2), Anna Kristina Samson 4, Annika Ljósstein 3, Katarina Stepanovic 3(1), Jastrid Gullaksen 2
**Brotskøst:** VÍF 1, Stjørnan 6
**Útvísingar:** VÍF 7, Stjørnan 4
**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Uni Wardum. Royndu alla tíðina at halda fast um hørðu linjuna, og í rótutu uppgerðini var hetta ikki alla tíðina líka lætt.



Kyndil-VB 16-31 (4-17):

# So er VB við

**Útlendsku leikararnir vóru aftur at síggja á vøllinum, og so var ikki stórvegis at gera hjá Kyndli, sum fekk av at vita frá meistarunum úr Vági**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá VB hevur verið í yvirskriftunum í bløðunum hesar seinastu vikurnar, hevur tað aloftast verið sum partur av útlendingamálinum, sum hevur verið í føroyskum hondbólti hesa seinastu tíðina.

Sjónligasta avleiðingin av hesum hevur verið, at meistararnir als ikki hava havt nakran útlending á liðnum í nakrar dystir, men nú tykist tann forðingin at vera beind av vegnum, og so er liðið aftur at meta sum eitt av teimum, ið fara at stríðast um meistaraheitið.

Og so var ikki serliga stuttligt hjá Kyndli at standa fyri. Frá byrjan av setti VB fulla ferð á, og tað var greitt, at tær nú høvdu nakað at prógva. Líka mikið, hvussu Kyndil royndi, so fingu tær ikki gjørt stórvegis fyri at steðga stormálopinum, og tað mundi kennast sum ein stórur létti, tá dómararnir at enda gjørdu av, at nú skuldi vera hálvleikur.



*VB hevði ikki stórvegis trupulleikar av at halda Kyndli frá sær sunnudagin*
*Mynd: Finnur Justinussen*

Eftir steðgin setti VB eisini ferðina nakað niður, soleiðis at vertirnir hóast alt fingu loyvi at spæla eitt sindur við. Tað bleiv tó ongan tíð talingur um, at nakar spenningur av nøkrum slag kom aftur í dystin. Til tess var munurin millum liðini alt ov stórur, og VB kundi tí einamest nýta tíðina til longu nú at fyrireika seg til komandi dystin. Hesin verður nevnliga í Vestmanna, har VÍF stendur og bíðar, og so er spurningurin, hvussu tað fer at spæla av. Eitt tykist í øllum førum víst, og tað er liðini í tí dystinum fara at geva alt tað,sum tey eru ment, til tess at prógva, hvør er best, tá spælið fyrigongur seg á vøllinum.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-VB 16-31 (4-17)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Ann Mari Wang 7(1), Annika Thomsen 3, Randi Wardum 3, Linda Weihe 1, Anja Heinadóttir 1, Anita Kjærbo 1
**VB:** Aukse Vysniaskaite 12(5), Gurið Mortensen 10, Rannvá Augustinussen 4, Diava Toumaite 3, Margreth Augustinussen 1, Laila Jespersen 1
**Brotskøst:** Kyndil 2, VB 7
**Útvísingar:** Kyndil 2, VB 1
**Dómarar úr Tjaldur:** Trygvi Mortensen & Kári Hansen.

# HM fyri teldur

**Júst sum dysturin móti Kasparov, sum endaði 2-2, var av, fór talvforritið Fritz við manning sum favorittur til Eysturríkis at taka lut í heimsmeistaraskapinum fyri talvforrit**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Tað eru ikki einans vælkendu forritini Fritz og Deep Junior, sum kunna geva menniskjanum mótstøðu. Nógvir bólkar av kringum høvdum royna í hesum tøkniligu døgum at gera júst sítt forrit til heimsins sterkasta. Í ár varð mett, at fleiri enn júst Fritz og Deep Junior fóru at kappast um fyrsta plássi. Og so varð.

### HM Shredder

Sekstan talvforrit høvdu boðað frá luttøku, men tað varð í veruleikanum bert ein kapping millum fýra talvforrit. Ellivu umfør vórðu leikt, men longu eftir seks umførum sást hvørji forrit fóru at stríðast um heiðurin sum hitt sterkasta á fold.

Sum væntað vórðu Fritz og Deep Junior millum hesi fýra, men Brutus og Shredder fylgdu væl við. Serliga Shredder við sínum øgiliga endaspurti vakti ans og endaði loksins á fyrsta plássi saman við Fritz, við 9,5 stigum. Við níggju stigum kom Deep Junior, sum miðskeiðis í kappingini sera óvæntað tapti móti forritinum Ruy Lopez, ið endaði aftast. Brutus fekk eitt fjórða pláss við 8,5 stigum.

Umdysturin mátti til fyri at finna vinnaran, og hesin bleiv leiktur sunnudagin. Heilarnir aftanfyri Fritz vórðu óivað fegnir, tá Fritz megnaði at fáa ein tryggan javnleik í fyrsta talvinum við svarta fólkinum. Tað er jú nærum ómøguligt at vinna á telduni við svarta fólkinum, hjá menniskjanum í øllum førum, og tí varð Fritz mettur sum favorittur undan seinna og seinasta talvinum í umdystinum. Ímóti øllum metingum og gitingum, eydnaðist tað Shredder at knógva favorittinum, enntá við svarta fólkinum, eftir eitt drúgvt talv. 89 leikir og fleiri tímar vardi talvið.

Shredder er als einki ókent forrit í talvheiminum, men óvæntað má úrslitið sigast at vera, serliga tá hugsað verður um at serkøn kring talvheimin einans tosa um Fritz ella Deep Junior sum avbjóðarar móti sterkasta menniskjanum, Garry Kasparov.

### Anand koppaður

Í Suðurspania er ein sterk kvikkapping júst liðug leikt. Nógvir sterkir telvarar luttóku, eitt nú Anand, Topalov, Judit Polgar og Radjabov. Svenski stórmeistarin Tiger Hillarp-Persson, sum telvar við kollfirðingum, slapp eisini í part.

Anand hevur hetta heystið verið einaráðandi tá tað kemur til kviktelving. Hann vann í oktober HM í kviktalvi við at vinna á Kramnik í finaluni, og beint eftir HM-kappingina vann hann enn eina sterka kvikkapping, eftir finalusigur á Topalov.

Í Spania varð tað júst Topalov sum dróg longra stráið, og fekk eina kærkomna hevnd. Bulgarski Topalov endaði fremstur, ósigraður, við sjey stigum av tíggju møguligum. Anand og stjørnuskotið Radjabov fingu 6,5 stig og eitt annað pláss at býta millum sín. Tiger hevði eina góða og heiðurliga kapping við 4,5 stigum, sum gav honum eitt sætta pláss. Polgar skuffaði við sínum fýra stigum og næstaftasta plássi.

### Karpov í øðini

Anatoly Karpov skuldi av røttum luttaka, men eftir at hann ikki fekk útsett sítt talv móti Radjabov í fyrsta umfari, valdi hann ikki at møta upp til seinna umfar og bleiv tí blakaður úr kappingini. Hetta var ikki fyrstu ferð, sambært hinum telvarunum í kappingini, at Karpov biðjur um útsetilsi orsakað av slíkum orsøkum. Karpov segði seg vera móðan eftir ein seinkaðan flúgvitúr, men Radjabov stóð fastur um avgerðina, helst eftir ráðgeving frá fleiri telvarum, og tað spann øði í gamla meistaran, sum tískil ikki vildi møtti upp næsta dagin. Karpov kallaði eftir hendingina stutt sagt fyrireikararnar og telvararnar fyri tápulingar. ≤

# Talvið hesa vikuna

Talvið er frá 9. umfari í heimsmeistaraskapinum fyri talvforrit. Shredder, sum vann HM, vinnur her leikandi lætt á einum annars góðum forriti, sum endaði í miðjuni í kappingini

Shredder - Quark
WCCC 2003 Graz (9), 28.11.2003

1.e4 e6 2.d4 d5 3.Bd3 (Hesin variantur verður sjáldan telvaður) 3...dxe4 4.Bxe4 Rif6 5.Bf3 c5 6.Rie2 Ric6 7.Be3 Fb6 8.Ribc3! (Shredder vil ikki brúka tíð uppá at verja b-finnuna, forritið velur aktivitet framum materiali) 8...Fxb2 9.Rb1 Fa3 10.0—0 Rixd4 11.Rixd4! Fxc3 12.Rib5 Fe5 13.Fd2 (Hvítur hevur longu nú avgerandi fyrimun! Eitt gott prógv um hvussu skjótt tær bestu talvteldurnar í dag revsa sjálvt smáir feilir. Hvat skal svartur gera? Einki kann gerast, er mítt svar) 13...a6

DIAGRAM



Støðumynd eftir 13...a6

14.Bf4! Fxf4 (Um frúgvin fór aðrar leiðir, vinnur Ric7+) 15.Fxf4 axb5 16.Rxb5 (Ikki er neyðugt at siga meir um restina av talvinum. Svartur kundi givist nú við reinari teldusamvisku) 16...Be7 17.Bxb7 Bxb7 18.Rxb7 0—0 19.Rxe7 Rid5 20.Fd6 Rixe7 21.Fxe7 Rxa2 22.Fxc5 g6 23.Rc1 Rb8 24.g3 h5 25.Rd1 Raa8 26.Rd7 Rd8 27.Rxd8+ Rxd8 28.Kg2 h4 29.c4 hxg3 30.hxg3 1—0